


**Roðin Økistænastan**
**Friðartún 1 • 620 Runavík**



# Fyribyrgjandi heimavitjan

## Fyribyrgjandi- og heilsufremjandi heimavitjan

Borgarar, búsitandi í Runavíkar -, Nes – og Sjóvar kommunu, og sum hava fylt 75 ár, fáa einaferð um árið møguleikan fyri eini ”fyribyrgjandi heimavitjan”

Roðin sendir bræv einaferð árliga fyrst og fremst til tey, ið ikki frammanundan fáa heimahjálp ella sjúkrarøkt.

## Einum tørvar ikki at hava ávísar trupulleikar fyri at fáa hesa vitjan

- ✓ Tygum gera sjálv/ur av, um tikið verður av tilboðnum um vitjan ella ikki
- ✓ Vitjanin gongur fyri seg sum ein samtala í tygara egna heimi
- ✓ Vitjanin varir í umleið ein tíma
- ✓ Tann, ið vitjar, hevur tagnarskyldu

**Endamálið við vitjanini er at kunna um fyribyrgjandi- og heilsufremjandi átøk, sum kunnu vera við til at varðveita og menna tygara førleika, soleiðis at tygum kunnu verða trygg/ur og før/ur fyri at vera heima longst gjørligt.**

## Hetta gerst við

- ✓ at dentur verður lagdur á fyribyrgjandi- og heilsufremjandi tiltøk
- ✓ at stimbra heilsu, førleika og trivna
- ✓ at binda um heilan fingur og stuðla um førleika og heilsu
- ✓ at smáir trupulleikar ikki vaksa
- ✓ at upplýsa um tiltøk og stuðulsmøguleikar
- ✓ at kanna blóðtrýst og blóðsukur

Fyribyrging í hesum føri er at forða fyri sjúku, at førleikin at røra seg verður varðveittur, at fremja góða heilsu og at menna tað, sum hevur týðning fyri heilsu og trivna tygara.

## Hvør kemur á vitjan?

Tað verður ein sjukrarøktarfrøðingur, sum kemur at vitja

**Samband**

Tygum eru altíð vælkomin at seta tygum í samband við Roðan

Mánadag - fríggjadag kl. 10.00–14.00 á tlf. 47 82 00
ella við telduposti: rodin@rodin.fo